FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

27. juni 2025
Mál: 25/14423

Tygara skriv: 52-078/2024

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-109/2024 frá Hervør Pálsdóttir, løgtingskvinnu, settur landsstýrismanninum í fiskivinnu- og samferðslumálum, Jóhan Christiansen, um oljudálking á landsvegum

Fyrispurningurin er soljóðandi

1. Hvørjar avleiðingar fær slík oljudálking fyri tey, sum eru orsøk til dálkingina?

2. Hvat verður gjørt fyri at fyribyrgja, at olja lekur á landsveg?

Hervør, viðmerkingar

Fleiri støður hava verið seinastu mánaðirnir, har ferðsla er tarnað orsakað av oljudálking á landsvegum, og har Landsverk skal vaska upp eftir oljudálkingina. Hesin spurningurin verður settur fyri at vita, um nakað verður gjørt fyri at fyribyrgja oljudálking á landsvegum, umframt um tað hevur nakrar avleiðingar fyri tey, ið eru orsøk til dálkingina.

Svar til spurning 1
Tað hava verið fleiri oljudálkingar á landsvegum seinastu tíðina. Olja er likin út á vegir frá stórum vinnuakførum. Orsøkinar eru mekaniskir feilir (brek) á akførum ella menniskjalig mistøk.

Oljudálkingar kunnu vera til stóran vanda í ferðsluni. Í sambandi við eina oljudálking, seta Landsverk og sløkkilið átøk í verk beinanvegin fyri at fáa oljuna av vegnum.

Útreiðslurnar av uppruddingararbeiðinum fella fyrst á Landsverk, ið umsitur landsvegirnar, og sum skal síggja til, at vegirnir verða vaskaðir. Tann, sum er orsøkin til oljudálkingina, skal síðani endurrinda Landsverki fyri hildnar útreiðslur.

Dálkingar vera vanliga kannaðar av Løgregluni, og tá kann viðkomandi eisini fáa eina bót, um viðurskiftini tala fyri tí.

Svar til spurning 2
Tá oljudálking er á vegum, samstarvar Landsverk við tilbúgvingina hjá sløkkiliðnum um at basa dálkingina. Vegirnir verða stongdir fyri ferðslu beinanvegin, og átøk verða sett í verk so skjótt sum møguligt fyri at avmarka vandan í ferðsluni og at basa dálkingina.

Landsverk leggur dent á, at samstarvið við sløkkiliðini virkar væl.

Landsverk hevur ein vaskibil, sum vanliga verður brúktur til av vaska vegir, tunlar og annað, og hann verður eisini brúktur til at vaska burtur olju av landsvegum.

Í næstum verður nýggjur vaskibilur keyptur, ið verður serliga útgjørdur til at vaska olju upp av vegum. Bilurin hevur ein tanga við umhvørvisvinarligum vaskievni, og tað verður eisini møguligt at fáa vatnið upp av vegnum, so hvørt sum vegurin verður vaskaður.

Viðmerkjast kann, at eftir kunngerð um flutning av vandamiklum farmi á landi frá 2019, kunnu flutningsfør ikki nýtast til flutning av vandamiklum farmi, fyrr enn tey eru sýnað og góðkend av veitara, sum er løggildur av Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.

Tað er trupult at tryggja, at oljudálkingar ikki koma fyri. Flutningsfeløg skulu sjálvandi gera, hvat tey kunnu fyri at avmarka dálkingina. Best er, um almennir myndugleikar og vinna samstarva um skilagóðar loysnir.

Jóhan Christiansen
Landsstýrismaður